# Ruðuleikin um Suðuroyarfjørð

**Nýggj ruta neyðug. Ruðuleikin við farmaflutningi og ferðafólkaflutningi heldur fram, hóast nýggj ferðaætlan kemur í gildi í næstu viku. Um páskirnar stóðu 30 bilar eftir á bryggjuni og trupulleikarnir hjá fiskavirkjunum eru ovurhonds stórir. Neyðugt er við skipið til farmin, vísir tingmaður á**

SKIPAFERÐSLA
*Dagfinn Olsen*



- Flutningurin úr Suðuroynni er um at koyra púra fastur, og at nýggj ferðaætlan kemur í gildi í næstu viku, loysir ongar trupulleikar, vísir Henrik Old, tingmaður á.

Við nýggju ætlanini verða nakrar tíðir fluttar, men Henrik Old metir, at hesar einamest eru til gangs fyri teir, ið flyta fisk víðari úr Havnini.

Longi hevur verið víst á, at fiskavirkini í Suðuroynni eru fyri vanbýti, og at tey eru fyri ovurhonds stórum trupulleikum í samband við farmaflutning til og úr oynni.

- Neyðugt er at fáa eitt skip, nakað sum Claymur, sum kann taka fiska- og farmaflutningin frá Smyrli. So kann Smyril aftur taka sær av bilum og fólki, sum hann gjørdi fyri nøkrum árum síðani, og sum upprunaliga endamálið var, vísir Henrik Old á.

Hann sigur, at nú er einki skil á leiðini, siglt verður ongantíð til ásettu tíð, og fólk og farmur er hvørt um annað, og nýggja ferðaætlanin loysir ikki trupulleikan.

Annar trupulleiki er, at tá fólk fara á ferð hampuliga ílatin, í góðum klæðum, so skal fartast millum farm og fiskaflutning.

- Ein má hava eyka klæðir við, sigur Henrik Old, ið ikki metir, at umstøðurnar eru at bjóða ferðafólki í dag.



### Bilar standa eftir í dagavís

Tað er eingin loyna, at ferðaleiðin til Suðuroyar er serstøk og ikki ber til at siga, sum á so mongum øðrum leiðum, at slepst ikki við hesaferð, so ber til at taka næsta túr, tí hesin er ofta eitt hálvt ella heilt samdøgur seinni.

- Tað er í heilum, at bilar standa eftir. Skírishóskvøld stóðu 30 bilar eftir á bryggjuni og næsti túrur var ikki fyrr enn hálvtannað samdøgur seinni, vísur Henrik Old á.

- Strandferðslan praktiserar, at skipið liggur í minst tveir tímar, so manningin er leys av skipinum. Hetta er fyri at spara pening og fyri at halda lógina um hvíld. Sjálvsagt er hetta ein trupulleiki. Byrjað verður t.d. ofta ov seint at koyra umborð, sigur Henrik Old, sum ikki so sjáldan er millum ferðafólkini, ið bíðar, meðan farmur verður avgreiddur.

Hann vísur á, at eitt skip til farmin er ein loysn. Onnur loysn er eyka manning til Smyril, ið so kundi siglt við fiski og farmi um náttina. Hetta krevur ikki so stóra manning, men tað er neyvan endalig loysn uppá trupuleikan.

Men hugsanin um eitt skip at taka sær av farminum liggur honum nærri.

- Skipið skuldi siglt bæði á Vág og Tvøroyri, so virkini í oynni eru javntstillaði, sigur Henrik Old, ið eisini vísir á, at t.d. saltfiskavirkini eru verri fyri, enn onnur, tí tey fáa ikki flutningsendurgjald, tá avskipað verður.

- Trupulleikin hjá bæði ferðandi og hjá fiskaframleiðarum í dag er, at eingin veit, hvussu verður, um tað slepst við, ella um seinkingar eru, sigur Henrik Old.

Hann vísur á, at hann hevur alla virðing fyri teimum, ið sita og royna at snikka eina ferðaætlan saman, men at hesi sita við einum óloysiligum trupulleika, verða ikki álvarslig stig tikin at loysa trupulleikan.

### Positivur trupulleiki

Frammi hevur verið, at trupulleikarnir eru loystir, men Henrik Old er ikki samdur.

- Smyril-Line fær t.d. ikki sínar bingjuvognar suður við Smyrli, tí hann er og lágur. Talan er eisini um, at bingjur skulu báðar vegir, sjálvsagt, bæði tómar og fullar, tí fiskur verður eisini keyptur á uppboðsøluni í Runavík, til tilvirkingar í Suðuroynni. Henrik Old metir tó, at hetta er ein positivur trupulleiki, men harvið eisini ein uppgáva, ið skal loysast. Nógv virksemi er og harvið nógvur flutningur.

- Í summar letur virkið í Hvalba upp aftur, so flutningurin er vaksandi. Hetta er ein positivur trupulleiki, ein stuttleiki, men sanniliga eisini ein trupulleiki, ið má loysast, sigur Henrik Old.

### Teistin varð seldur er orsøkin

Og suðuroyartingmaðurin er ivaleysur, tá hann vísur á, at trupulleikin stavar frá søluni av Teistanum.

- Hetta botnar í, at Teistin varð seldur. Virkini í oynni nýttust tá Teistin sigldi ikki at senda fiskin til Havnar, fyri at senda av landinum, tí siglt varð beinleiðis úr Suðuroynni og til Skotlands. Júst tá sølan fór fram var ikki so nógvur fiskur, men vit eru ikki komin úr hesum trupulleikanum enn, sigur Henrik Old.

- Hendir nakað við Smyrli, so fær tað katastrofalar fylgjur. Bæði fyri ferðafólkaflutningin, men sanniliga eisini fyri fiskaflutningin. Og alt kann væntast, tí talan er um eitt 30 ára gamalt skip, sigur Henrik Old.

Hann vísur á, at varð annað skip sett at taka sær av farminum, so kundi skipið eisini tikið sær av øðrum leiðum, t.d. um Leirvíksfjørð, so lætt kundið verið um trýstið har, tá á stendur.

Men at talan er um ein trupulleika, ið ikki verður loystur við nýggju ferðaætlanini, er Henrik Old vísur í, og hann vísur á, at nú tíðinar eru góðar, kann eisini væntast, at fólk ferðast meira summarhálvuna, so neyðugt verður við tiltøkum á leiðini um Suðuroyarfjørð.

# Almenni arbeiðsmarknaðurin fingið sáttmálar

**Landstýrismaðurin í fíggjarmálum boðaði í tíðindaskrivi í gjár frá, at eitt av málunum, hann setti sær sum fíggjarmálaráðharri er nú komið eitt stig nærri. Her verður hugsað um at fáa skipað viðurskifti í lag við almenna arbeiðsmarknaðin.**

SÁTTMÁLI
*Ingrid Bjarnastein*

Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur fyri fyrstu ferð í søgu felagsins gjørt sáttmála við landsstýrið um arbeiðsviðurskifti hjá limum teirra á almenna arbeiðsmarknaðinum. Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálastýrið hava undirskrivað sáttmála, ið fevnir um arbeiðskvinnur, sum starvasst sum reingerðarfólk, gongsgentur og tílík starvsfólk á stovnum hjá landinum og sjálvsognarstovnum í Tórshavnar og Kirkjubøar Kommunu, sum Fíggjarmálastýrið hevur málsræði til at áseta lønar- og setanarviðurskifti fyri.

Sáttmálin kemur í gildi tann 1. mai 2002, og sigast kann upp við eini tríggjar mánaða freist, tó í fyrst lagi tann 1. oktober 2003.

Tann 1. mai 2002 hækkar lønin 5,8% eins og á privata arbeiðsmarknaðinum, og tann fyrsta mars 2003, hækkar hon 3%. Øll tey, sum starvast meira enn 15 tímar um vikuna, verða nú mánaðarlønt.

Staklutirnir í sáttmálanum eru umframt løn: setanarbræv, eftirløn, arbeiðstíðarskipan, gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð, frítíð og frídagar, uppsagnarfreistir, seming og gerðarættur, álitisfólkaskipan, rættindi hjá nevndarlimum til fakfelagsarbeiði, løn undir sjúku, løn tá børn eru sjúk og starvsaldur, 3 ár og 5 ár.

– Eg eri sera væl nøgdur við sáttmálan, og eina mest um, at hesin stóri starvsbólkur á almenna arbeiðsmarknaðinum nú endiliga eisini hevur fingið skipað viðurskifti við arbeiðsgevaran, sigur Karsten Hansen at enda í tíðindaskrivi.

Vikuskifti
Nr. 65 • leygardagur • 6. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Tíðin er búgvin at samtykkja ein mentunarpolitikk



Lesið s. 4 og 5



*Tríburarnir í Fuglafirði: Teodor, Tórður og Birgir fyltu trý seinasta leygardag*

Tríburarnir Teodor, Birgir og Tórður:

# Orkubumbur um ein háls

Tann 30. í triðja fyltu tríggir dreingir í Fuglafirði trý ár. Talan er nevniliga um tríburarnar Teodor, Birgir og Tórður, sum leygardagin í seinastu viku rundaðu tey trý

FAMILJULÍV
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens K. Vang*

Trý er ofta eitt eydnutal. Í Bíbliuni og í ævintýrum er trítalið altíð tað "góða" talið, meðan sjey, níggju og onnur tøl verða meir ella minni brúkt sum tey "óndu" tølini.

Og tað var ikki sørt ævintýrkent at stíga inn í garðin í Fuglafirði.

Tann fyrsti kemur rennandi ímóti okkum "Hygg!! Eg havi slikkipinn!!". So kemur tann næsti og áðrenn tú veitst av, standa tríggir fittir smádreingir og veipa við sleikisneisum, sum um vilja teir vísa, at teir allir eru eins.

Teodor, Birgir og Tórður eru tríburar. Teir eru tríggir lívligir dreingir, sum renna runt og spæla í garðinum. Eisini grannin, Brandur, sum er fýra, sleppur upp í part.

"Hygg, har er ein slanga, sum krógvar seg í moldini", sigur Teodor stoltur, og peikar niður í moldina í garðinum.

Jú, nakað heilt serstakt var at síggja hesar dreingir spæla saman.

### 3 av øllum

Tá tú komst innar í lítlu hugnaligu húsini á Bakkavegnum uppdagaði tú beinanvegin, at her búðu fleiri smábørn. Uppi í baðirúminum – ella rættari, runt í øllum húsinum vóru lutir, ið søgdu tær, ella á ein ella annan hátt bóru brá av, at her vóru tríburðar í húsinum. Í køkinum vóru tríggir barnastólar, í stovuni sótu tríggjar bamsur, í gongini lógu tríggjar føroyskar bundnar troyggjur... Trý var tað afturgangandi talið.

Men hvussu er tað at hava tríggjar dreingir í húsinum? Vil tað siga, at tað er tríggjar ferðir so strævið, sum at hava eitt?

– Tað er lættasta sak í verðini, sigur pápin, Dia, skemtandi. – Eg dugi ikki at siga, um tað er tríggjar ferðir so strævið, tí vit hava ongantíð bara havt eitt.

– Í fyrstuni er tað eitt sindur strævið, sigur Jónfríð, sum er mamma Teodor, Birgir og Tórða. – Nú haldi eg, at tað strævna er yvirstaðið. Vit hildu tað tó ikki vera so strævið beint tá vit vóru í tí, men nú tá vit hyggja aftur, duga vit væl at síggja, at tað hevur verið nógv strævnari fyrr enn nú.

Foreldrini siga, at ein noyðist at vera rættiliga sterkur sálarliga fyri at megna at hava trý børn.

– Men beiggi mín eigur eina dóttir, sum er javngomul við okkara dreingir, greiðir Dia frá. – Og eg haldi, at hann hevur havt tað nógv strævnari enn vit.

Víðari greiða tey frá, at tá dreingirnir vóru minni, so vóru tey noydd til at halda eina fasta rútmu. Ikki bar til at fara rennandi í hvørt húsahorn í føðingdag, tí rútman mátti haldast, tí

Framhald á síðu 2